gult16 cyan16 magenta16 svart16



ÚT AT KOYRA

## Laguna 5 stjørnur



Renault Laguna, ið kemur á danska marknaðin í hesum mánaðinum, er fyrsti persónbilur, sum hevur fingið 5 stjørnur í EuroNCAR crash-testunum.

*Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S*

## Suzuki franskan diesel-motor



Ein tann best umtókti jeepurin í Danmark, Suzuki Grand Vitara, kemur nú á marknaðin við einum 2.0 litur turbodieselmotori við beinleiðis commonrail innsprænging. Motorurin er frá PSA-bólkinum (Peugeot/Citroën) í Fraklandi.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Michelin maðurin



Hóast hann er 102 ára gamal, bleiv kendi Michelin maðurin, Bibendum, av eini dómsnevnd í Financial Times, kosin til heimsins besta búmerki, millum 50 af heimsins mest kendu búmerkjum.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Peugeot 307 – næsta ár sum stationvognur

**Peugeot 307, ið varð frumsýndur á bilaframsýningini í Geneve, kemur næsta ár sum stationvognur, seinni kemur ein sedan og møguliga eisini ein cabriolet**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Týski spiónmyndamaðurin Hans G.Lehmann hevur undir sínum upptøkum norðuri í kuldanum, avdúkað ein Peugeot 307 stationcar. Peugeot 307 er sum kunnugt avloysarin hjá 306-røðini. Stationvognurin kemur at hava longri aksulfrástøðu enn útgávurnar við 3 og 5 hurðum. Hetta kemur at geva møguleika fyri 7 sitiplássum, við 2 eykasetrum aftast, sum kunna leggjast saman undir dúrkinum tá ikki er brúk fyri teimum. Í fyrstu atløgu kemur bilurin við bensinmotorum við beinleiðis innsprænging, og tveimum HDI dieselmotorum, sum verða ávikavist 1,6 og 1,8 litur.

*Keldur: FDM / Motor Motor Magasinet*



*'Peugeot 307 stationvognurin kemur at hava longri aksulfrástøðu enn útgávurnar við 3 og 5 hurðum*



*Konseptbilurin, Peugeot Prométheé, ið var á Paris bilaframsýningini í fjør, minnir nakað um nýggja 307 stationvognin*

# BMW 330d – við 6 syl. turbodiesel motori



**Við 6 syl. dieselmotorinum er BMW 330d ein bilur, har tað so at siga ikki merkist at hann er diesel. Motorurin larmar lítið, kraftar væl, eins og brennievninýtslan er sera lág**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tann væl umtókti 6 syl. commonrail turbodiesel motorurin, sum er at finna í fleiri øðrum BMW bilum, fæst nú eisini í 300 røðini. BMW eru komnir sera væl frá at minka um ristingarnar og harðligu motorgongdina, sum eykenna vanligar dieselmotorar. Tað er bert í tómgongd, at tað líka merkist, at bilurin er diesel. Undir koyring er 330d eins og ein bensindrivin bilur at koyra.

### BMW 330d

| | |
|---|---|
| Motorurin | 6 syl. 2.9 litur diesel 184 hk v/ turbo og commonrail innsprænging |
| 0-100 km/t | 7,8 sek. |
| Oljunýtsla | 14,9 km/l |
| Dekkstødd | 205/50-17 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 447 cm |
| Breidd | 174 cm |
| hædd | 142 cm |
| Eginvekt | 1475 kg |
| Viðførisrúm | 440 litrar |

gult17 cyan17 magenta17 svart17

ítróttur

Nr. 79 • hósdagur • 26. apríl 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sogndal vil hava Flo

**Fyrrverandi norski landsliðsleikarin verður helst ikki í Onglandi komandi kappingarár, og Sogndal sigst vera millum møguligu framtíðarfeløg hansara**

NOREG
*Jákup Mørk*



*Møguliga verða umstøðurnar hjá Kurt at gera seg galdandi verri, um Sogndal ger av at keypa Håvard Flo*

Sambært norskum fjølmiðlum, roynir norska Sogndal í løtuni at styrkja um liðið, við at fáa ein fyrrverandi norskan landsliðsleikara til felagið. Talan er ikki um nakran ókunnugan leikara í Sogndal. Håvard Flo, sum annars er systkinabarn Tore Andre Flo, spældi síni fyrstu fótbóltsár við felagnum hjá Kurt og Julian, áðrenn yrkisleið hansara førdi hann til størri norsk feløg, áðrenn hann setti kós móti útlandinum.

Í útlendskum fótbólti hevur hann roynt seg í Danmark, Týsklandi og Onglandi har hann nú spælir við Wolverhampton Wanderers í næst bestu ensku deildini. Eisini hevur hann roynt seg á norska landsliðnum, har størsta uppliving hansara helst man vera sigurin á Brasilia í HM-kappingini í Fraklandi í 1998.

### Plássið hjá Kurt

Tað er eingin loyna, at Flo orsakað av uppruna sínum er ein leikari, sum áskoðararnir hjá felagnum skjótt høvdu tikið til sín. Navnið, Flo, er nær knýtt at felagnum, og fyrri viðhaldsfólkini vildi tað helst verið gleðiligt, um sterki áleyparin valdi at enda yrkisleið sína aftur í felagnum.

Hinvegin er lítið at ivast í, at eitt møguligt keyp av framherjanum vildi minkað um spælitíðina hjá Kurt Mørkøre á liðnum. Flo er eins og Kurt ein áleypari, sum fyrst og fremst hevur sína styrki inni í brotsteiginum, og við allari virðing fyri Kurt, so kann ikki roknast við, at hann uttan víðari vildi verið tikin fram um fyrrverandi norska áleyparan. Tað kann tó heldur ikki útilokast, at eitt møguligt keyp av Flo skal byrgja upp fyri, at Sogndal møguliga fer at missa álopsfelagan hjá Kurt, Tommy Øren. Fleiri útlendsk feløg sigast at vera áhuga í honum, og áður hava munandi milliónaupphæddir verið nevndar, tá mett verður um virðið á leikaranum.

Umframt Sogndal sigast Lyn, Moss og Bryne at vera áhugað í at keypa Håvard Flo, sum annars eisini sigur seg hava eitt tilboð frá einum donskum superligu felag.

## Seinkað kappingarskipan

Hóast tað nú bert eru tríggir dagar eftir, til farið verður í holt við landskappingina í bestu mansdeildini, so er eingin kappingarskipan komin frá FSF enn. Vanligt hevur annars verið, at hendan er at fáa kring landið stutt undan kappingarársbyrjan, men í ár er hon so nakað seinkað.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur við Sosialin, at tað helst verður fyrst í komandi viku, at kappingarskipanin verður at fáa. Hann heldur ikkki at nøkur serlig orsøk hevur verið til seinkingina, annað enn at tað fleiri smálutir skuldu fáast upp á pláss, áðrenn alt var liðugt.

-jm

## FM í badminton

**Sunnudagin verður avgjørt, hvørji verða føroyameistarar í meistarabólkinum í badminton**

BADMINTON
*tíðindaskriv*

Hetta vikuskiftið verður FM í badminton fyri meistarabólkin leikt í Badmintonhøllini í Havn. Leikt verður í einmansleiki, tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.

Lagt verður til brots leygarmorgunin klokkan 10.15, og síðani verður spælt allan leygardagin á tamb, til tað ætlandi er funnið fram til, hvørjir finaluluttakararnir verða.

Finalan í einmansleiki verður so á skránni sunnu-dagin kl. 13.00, og eftir hetta verður so farið til finaludystirnar í ávíkavist tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.

# Jugoslavi í Klaksvík

**Fyrrverandi jugoslaviskur landsliðsleikari venur í hesum døgum við KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*




*Møguliga er her talan um tríggjar teir mest týðandi KÍ-leikararnar hetta kappingarárið. Allan Joensen, Tomislav Sivic og Alexander Djurdjevic*

*Mynd: Eyðun*

Tað eru nú nakrar vikur síðani, at tað av fyrstan tíð frættist, at ein jugoslaviskur leikari hevði spurt seg fyri hjá KÍ, um hann møguliga kundi spæla við teimum hetta kappingarárið. Leiðsla og venjari felagsins svaraðu, at leikarin sjálvandi skuldi vera væl komin at royna seg, men at teir fyrst máttu síggja hann, áðrenn teir kundu lova nakað sum helst.

### Ikki hvør sum helst

Týsdagin vandi jugoslavin so fyri fyrstu ferð við klaksvíkingum, men longu undan venjingunum var tó greitt, at talan er ikki nakran tilvildarligan leikara, um KÍ ger av at styrkja liðið við jugoslavanum. Djordjevic, sum í dag er 32 ára gamal, og sum yrkisleikari hevur hann spælt meira enn 300 dystir við Partizan Belgrade, sum má metast sum næst størsta felagið í Jugoslavia. Har umframt hevur hann eisini leikt dystir við jugoslaviska landsliðnum, so lítið er at ivast í, at fótbóltsevnini eru í lagi.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa orðið á KÍ-venjaran, Tomislav Sivic, men úr Klaksvík hava boðini tó verið greið undan kappingarárinum. Teir hava alla tíðina sagt, at skal talan verða um at fáa útlendskan styrk til liðið, skal talan veruliga vera um ein leikara, sum er væl betri enn teir, sum liðið longu hevur.

Havandi í huga tað, sum Djordjevic longu hevur avrikað, er eingin ivi um, at hann veruliga kann gerast eitt aktiv hjá felagnum. Aldurin skuldi ikki verið nøkur forðing fyri, at talan framvegis er um ein framúr góðan leikara, so møguliga sleppa klaksvíkingar longu at síggja leikaran í dysti, tá KÍ sunnudagin setir sjøtul á landskappingina við heimadysti móti GÍ.